Tað var Í oktober í fjør, at vit skrivaðu um dreparasjúkuna, sum óvanliga nógvir føroyingar hava, og uppaftur fleiri eru berarar av. Roknað verður við, at tað liva millum 30 og 40 føroyingar við sjúkuni, harav bert umleið helvtin veit av tí. Uppgávan er tí at finna tey, sum ikki vita av tí, so tey kunnu koma í viðgerð. Tí tey liva hvønn dag upp á náði. Greinirnar kunnu lesast uttan login á www.sosialurin.fo

Sosialurin

Nr. 191 • mánadagur • 6. oktober 2008 • 82. árg. • Kr. 15,00

Peter Lundin nýggja konu: Havnargenta gift seriumordara Síða 11

Danska kreppuloysnin: Innlán hjá føroyingum tryggjað Síða 8-9

Endiliga komTórsbreyt Síða 40-41

UHA! EB/Streymur Ítr 17-28

DULD DREPARASJÚKA Í FØROYUM

Millum 30 og 40 føroyingar vita ikki av, at teir bera eina lívshættisliga sjúku, sum er arvilig og eitur CTD. Danskur professari vísir á, at hesi fólk eru sum tikkandi bumbur, ið kunnu smella í gólvið, nær tað skal vera

Síða 12-13

12 TÍÐINDI Sosialurin Nr. 191 - 6. oktober 2008

Deyðilig sjúka duld millum føroyingar

Millum 30 og 40 føroyingar vita ikki av, at teir bera eina lívshættisliga sjúku, sum er arvilig og eitur CTD. Sjúkan er skjótt at staðfesta og lætt at viðgera, men fólk verða bert kannað, um onkur í familjuni longu er sjúkur ella deyður av sjúkuni

HEILSUMÁL

Rigmor Dam

Landsstýrismaðurin sera illa við

Hans Pauli Strøm er sera illa við, tá hann hoyrir um livshættisligu arviligu sjúkuna, sum einir 30-40 føroyingar ganga runt við. Hann fer alt fyri eitt at kanna tað nærri, so tiltok kunnu setast í verk

HEILSUMÁL

Rigmor Dam

Dreparasjúka í o

FAKTA UM CTD

Nógv fleiri føroyingar enn onnur fólkasløg eru berarar av sjúkuni CTD, Carnetine Transporter Defect. Hetta er gamla søgan um inngiftan og fjarðskotna oyggjalandið.

Sambært serfrøðingum er ein av hvørjum 18 føroyingum berari av sjúkuni, meðan ein av hvørjum 1.300 longu hava sjúkuna. Til samanberingar er títtleikin í USA ein av hvørjum 100.000 og í Japan ein av hvørjum 40.000. Fáa tveir berarar barn, eru 25 prosent sannlíkindini fyri, at barnið fær deyðiligu sjúkuna CTD, sum eisini er undir illgruna fyri at vera orsøk til fleiri tilburðir av vøggudeyða.

CTD, ella Carnitine Transporter Defekt, hevur við sær, at fólk uttan nakra ávaring doyggja heilt ung. Annaðhvørt av búksjúku sum pinkubørn, ella sum heilt ung av hjartasteðgi. Orsøkin er, at tey mangla eitt evni í kroppinum, sum eitur Carnitine.

Av tí, at sjúkan higartil hevur verið ókend millum vanlig fólk í Føroyum, hava vit mist nógv børn og ung, sum brádliga eru deyð undir løgnum umstøðum, sum ongin hevur kunnað forklárað.

Longu í 1997 fann týski barnalæknin Ulrike Stauervald, sum tá starvaðist á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum, eitt samband millum føroysk børn, sum vórðu deyð brádliga, og arvaligu sjúkuna CTD.

Fólk við sjúkuni mangla evnið carnitine og tað er lívshættisligt. Við einfaldari viðgerð, har tey fáa evnið sum ískoyti, kunnu tey liva eitt normalt lív. Sjúklingar, sum ikki eru í viðgerð eru ofta sjúkir, hava lítla orku og veika verjuskipan.

Men tað krevur, at sjúkan verður uppdagað tíðliga, so kroppurin ikki nær at taka skaða. Síðan 2006 hava øll nýbakað foreldur fingið tilboð um, at børn teirra kunnu verða kannað fyri CTD og aðrar viðføddar sjúkur.

Illgruni er um, at føroyingar liva longri við sjúkuni enn onnur fólkasløg, tí vit eta nógvan mat við carnitine í, eitt nú nógv kjøt.

Av tí, at sjúkan higartil hevur verið ókend millum vanlig fólk í Føroyum, hava vit mist nógv børn og ung, sum brádliga eru deyð undir løgnum umstøðum, sum ongin hevur kunnað forklárað.

Nýggi landsstýrismaðurin í heilsumálum, Axel Johannesen, arvar eina óhugnaliga sjúku frá undanmanni sínum, Hans Paula Strøm. Dulda arvaliga dreparasjúkan, CTD, livir sítt óhugnaliga lív millum føroyingar, og myndugleikarnir hava í skjótt eitt ár togast um, hvørt allir føroyingar skulu verða kannaðir ella ikki. Um vikuskiftið kravdi sjúkan enn eitt ungt lív

HEILSA

Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Fyri níggju mánaðum síðani gjørdi Sosialurin á fyrsta sinni almenningin varugan við, at millum okkum føroyingar er ein lívshættislig duld arvalig sjúka, CTD.

Tá hevði sjúkan kravt enn eitt ungt mannalív.

Um vikuskiftið hendi tað ræðuliga aftur, at enn eitt ungt menniskja mátti lúta fyri sjúkuni.

Fríggjadagin 29. juli kl. 16:53 skrivaði 25 ára gamla kvinnan soleiðis á veggin hjá Facebookbólkinum »Familjur við CTD í Føroyum«:

»Eg havi akkurát fingið staðfest sjúkuna, eg veit ik hvat mítt tal er.«

Tveir dagar seinni doyði hon av sjúkuni, sum myndugleikarnir hava fyrireikað eina tilbúgving upp á í skjótt eitt ár.

Samstundis hevur øll kanning, kunning og viðgerð verið latin upp í hend-